## Ensk viðhaldsfólk álopin í Moskva

Sjálvt um eyka løgreglulið á gøtuni, hava tað verið trupuleikar í russiska høvuðstaðnum. Enska uttanríkisráðið kunngjørdi sambært BBC, at fýra ensk fótbóltsviðhaldsfólk eru blivin bangaði í Moskva undan EM-undankappingardystinum millum Russland og Ongland í gjárkvøldið. Russland vann dystin 2-1 aftan á at Wayne Rooney hevði lagt gestirnir á odda. Ein talsmaður sigur, at tvey av viðhaldsfólkunum eru viðgjørd og útskrivaði, meðan hini bæði væntandi verða útskrivaði, seinni í dag.

## Útlendingarnir í TB farnir í feriu

Útlendingarnir hjá TB hava allir fingið vetrarfrí, teir fóru av landinum týsdagin, og koma væntandi aftur til kappingarbyrjan í komandi ári. - Orsøkin til at teir eru farnir í feriu nú, er tann at TB eftir ætlanini skuldi spæla móti HB, síðsta sunnudag, men dysturin varð útsettur, og ferðaseðlar til útlendingarnar vóru longu bílagdir, sigur ein harmur Jóan Petur Olgarsson, formaður í TB. Hetta at TB verður sínar útlendsku spælarar fyri uttan í dystinum ímóti HB leygardagin, fer óivað at seta sín dám á dystin.

# Javnt høgt støði

**Persónligu mistøkini vóru fá men dýr. Mann fyri mann kunnu flestu leikararnir tó vera væl nøgdir við sítt egna avrik**

LANDSLIÐIÐ
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



*Flestir av teimum 11, sum byrjaðu dystin á Olimpiysky tjóðarleikvøllinum í Kiev, kunnu vera væl nøgdir við sítt avrik*
*Mynd: Rólant Waag Dam*

**1. Jákup Mikkelsen, 53/-124:**
Hevði tað ikki verið fyri hann, hevði tapið helst verið munandi størri. Vardi fantastiska væl fyri, tá ein ukraini gjørdist púra blankur við honum tíðliga í dystinum. Hevði aðrar ónatúrliga góðar bjargingar, men átti málið til 3-0, har hann ikki megnaði at halda bóltinum. Kom somuleiðis á millumhond, tá Ukraina skoraði til 2-0. Samanutikið spældi hann ein frálíkan, men ikki lýtaleysan dyst.

**3. Johan Troest Davidsen, 1/0:**
Fekk sín fyrsta landsdyst og kann vera errin av honum. Tóktist eitt sindur fjálturstungin at byrja við, tá hann sparkaði fleiri adressuleysar bóltar langt niðan í høgra borð. Varð eisini fangaður á skeiva beininum og settur av, tá Ukraina skoraði fyrsta málið, men vísti annars gjøgnum allan dystin, at hann longu nú er klárur at átaka sær uppgávuna at røkja handan sessin.

**13. Óli Hansen, 2/0:**
Slapp ikki óvæntað at spæla sín næsta landsdyst. Var ikki heilt so sjónligur sum makkarin í miðverjuni, men tóktist at stilla seg rætt. Somuleiðis riggaði hann væl í samstarvinum við Jón Róa Jacobsen, og spældi sum heild ein fínan dyst í miðverjuni.

**5. Jón Rói Jacobsen, 30/0:**
Spældi kanska sín besta landsdyst nakrantíð, tá hann tók leiklutin sum stýrimaður í verjuni á seg. Vann eina rúgvu av bóltum, bæði á luftini og á vøllinum, og spældi seg altíð skilagott av við hann. Útstrálaði yvirskot og tað kom millum annað til sjóndar, tá hann móti dystarenda kom framvið í álop, tá flestu av hinu leikarunum ikki orkaðu meir.

**17. Einar Hansen, 2/0:**
Var kanska tann føroyski leikarin, sum hevði bóltin mest. Loysti sína uppgávu sera væl, hevði dirvið og yvirskot at spæla heldur enn sparka fótbólt. Kom eisini framvið móti dystarenda og royndi seg við einum skoti. Var undir øgiligum trýsti stóran part av dystinum, men gjørdi so at siga bara eitt mistak. Tað kostaði hinvegin mál, tá hann skuldi temja bóltin aftur til Jákup Mikkelsen, men heldur seldi bæði seg og málverjan.

**9. Símun Samuelsen, 14/1:**
Kanska tann einasti leikarin á føroyska liðnum, sum ikki kann vera nøgdur við sítt avrik. Faktiskt var tað millum lítið og einki, sum eydnaðist hjá suðuroyinginum í Noreg og misti hann nógvar bóltar. Eitt innlegg í seinna hálvleiki sat tó akkurát sum tað skuldi, og bólturin hevði uppiborið betru lagnu enn at fara framvið.

**8. Mikkjal Thomassen, 9/0:**
Spældi bert nakrar fáar minuttir, áðrenn hann lat seg útskifta við skaða. Tískil kunnu vit ikki meta um avrik hansara.

**4. Atli Danielsen:**
Spældi ein branddyst á sentrala miðvøllinum. Ein fragd at eygleiða. Tók altíð skilagóð avgerðirnar, tordi at vera frekur og halda upp á bóltin, soleiðis at saknurin í Súna Olsen ikki merkist.

**10. Christian Høgni Jacobsen, 38/2:**
Varð fluttur fram á vøllin fyri at fáa meiri burtur úr hansara offensivu eginleikum. Hevði tó eina rúgvu av verjukendum uppgávum, sum bóru við sær, at hann ikki kom so nógv við frameftir. Hevði tó tríggjar av teimum frægastu føroysku royndunum eftir innlegg frá Símun Samuelsen og fríspælingar frá Rógva Jacobsen og Christian Lamhauge Holst. Mál bleiv tað tó ikki til.

**14. Christian Lamhauge Holst, 9/0:**
Rann, strýddist og arbeiddi sum fyri fleiri. Serliga í seinna hálvleiki, tá hann var einsamallur heilt frammi. Markeraði seg kropsstyrki og bóltførleika, ið eingin annar av føroysku leikarunum hevur. Hevði eisini eitt dundurskot beint framvið málinum í seinna hálvleiki. Eitt av hæddarpunktunum á føroyska liðnum.

**6. Rógvi Jacobsen, 47/9:**
Ikki heilt so sjónligur sum onkra aðru ferð. Komst fyrst og fremst av ógvusliga trýstinum í fyrra hálvleiki, har Rógvi hjálpti væl aftur eftir, men hevði minni at arbeiða við fram eftir. Varð tikin aftur á miðvøllin í seinna hálvleiki til at hjálpa Atla Danielsen og Tem Hansen, og fekk við síni kropsstyrki lætt nakað um teirra uppgávu.

**15. Tem Hansen, 2/0:**
Avloysti Mikkjal Thomassen tíðliga í dystinum og gjørdi tað sera væl. Vísti seg sum ein bólttryggan og skilagóðan leikara, ið dugdi at flyta bóltin, tá ferðin var høg. Dugdi sera væl at finna liðfelagan Christian Lamhauge Holst. Datt tó eitt sindur burtur ímillum móti dystarenda, men kann vera væl nøgdur við sítt avrik.

**11. Andrew av Fløtum, 27/1:**
Fekk eitt korter á vøllinum, tá hann eins og móti Fraklandi loysti Christian Lamhauge Holst av. Ein ótakknemlig uppgáva at koma inn, tá støðan var 5-0 og alt avgjørt. Royndi at renna, trýsta og gjørdi annars tað, hann kundi fyri at órógva ukrainsku verjuna.

**12. Hanus Thorleifsson, ?/0:**
Kom inn beint áðrenn yvirtíðin byrjaði, og fekk soleiðis ikki víst nakað sum helst. Innskiftingin kann eisini tulkast sum eitt slag av tøkk frá Jógvan Martin Olsen, nú Hanus Thorleifsson kom við til Ukraina við so stuttum skotbrái.